# Nøvn

## Minningarorð um Johan Olevinus Frithiof Olsen, Rituvík

### f. 3. januar 1943, d. 6. desember 2009

Frithiof er sonur til Karin (f. Tausen úr Runavík) og Magnus Anton Olsen úr Rituvík. Frithiof var triði í røðini av einum systkinaflokki á tíggju.

Saman við systkjunum hevði Frithiof ein tryggan og góðan uppvøkstur hjá mammuni og pápanum í heimbydini, har hann eisini fekk sína 7 ára skúlagongd. Hann luttók í øllum vanligum arbeiði heima við hús, til hann sum blaðungur fór í skristovulæru í Havn á Føroya Fiskasølu, har hann eisini arbeiddi eftir lokna útbúgving. Seinni arbeiddi hann eisini hjá Hjalgrím Davdisen, el-innleggjara í Havn.

Í fyrra helmingi av 1960-unum fór hann til skips. Hann var m. a. við Havborgini, Jógvan Norði og Nornagesti. Seinni í 1960-unum var hann og róði út í Grønlandi m. a. saman við beiggjunum, sum mannaðu seksæringin Karin. Hann róði út í Kangarsuk og á Kappanum.

Í 1969 fór Frithiof á bíbliuskúla í Noreg. Hetta var ein rík og gevandi tíð hjá honum. Har møtti hann eisini ungu argjagentuni – Magnhild.

Heimafturkomin arbeiddi hann stóran part av tíðini sum skrivstovumaður m. a. hjá Frants Petersen, elinnleggjara í Runavík, Elhúsinum í Runavík, Brøður Petersen í Fuglafirði, Mekanik í Runavík og arbeiðarafelagnum Hæddini, sum eisini gjørdist hansara seinasta arbeiðspláss. Haraftrurat avgreiddi Frithiof árliga fleiri roknskapir og skattauppgerðir fyri smærri fyritøkur og einstaklingar. Frithiof vildi altíð gera sítt besta, so skrivstovuarbeiðið varð framt á fullgóðan hátt, og fyri hetta varð hann nógv virdur.

Frithiof hevði eisini góðan hug til sjógvin, og tí var tað heilt natúrligt hjá honum av og á at skifta til sjólívið í styttri ella longri tíðarskeið.



Soleiðis royndi hann seg eisini sum línu- og trolmaður saman við beiggjunum umborð á Karini. -Altíð nærlagdur, kvikur og góður at samstarva við.

Tann 12. september í 1970 gingu Magnhild og Frithiof saman í hjúnalag og keyptu hús í Rituvík. Frithiof og Magnhild eiga 6 børn: Hans Arni, f. 1971 (búsitandi í Rituvík), Súsanna Maria f. 1972, (búsitandi í DK), Kári, f. 1974 (búsitandi í Rituvík), Birgir, f. 1975 (búsitandi á Skála), Jógvan, f. 1977 (búsitandi á Toftum), og Hanna, f. 1983 (búsitandi í Rituvík).

Frithiof var ein sera góður sonur, beiggi, maður, pápi, verpápi og abbi. Einki var ófført, tá ið hann vildi gleða síni kæru. Minnist væl, hvussu vit yngru systkini kundu gleða okkum, tá ið Frithiof kom úr Havn, ella av skipi, tí tá fingu vit altíð okkurt gott frá honum. Hansara trúfesti til familjna sást ikki minst nú, tá ið abbabørnini komu. Arbeiðið sum skrivstovumaður gjørdi, at Frithiof kom at hava nógv samskifti við fólk, og ikki so sjáldan komu fólk á gátt í heiminum í Rituvík, har gestablídni og trúfesti var eitt eyðkenni. Vit eru mong, sum hava notið gott av hesum trúfesti og gestablídni í heiminum hjá Frithiof og Magnhild.

Aftanfyri hendan róliga, siðiliga og kærleiksfulla mann, abba og beiggja, lá ein klettafløst guðstrúgv, sum eisini bar Frithiof ta seinastu tíðina, hóast sjúkan plágaði hann av álvara. Frithiof var serliga góður við ávísar sangir og sálmar. Millum hesar vóru: " Til himnaheimið man ferðin gá....." og "Upp alt, ið Harrin hevur gjørt....." Í áleið 30 ár var Frithiof deknur, kirkjuráðslimur og kassameistari í Rituvíkar kirkju. Frithiof tók hesa uppgávu í størsta álvara og visti, at mong eisini virðismettu hansara trúfesti til kirkjuna.

Frithiof var nógv nívdur av sjúku seinastu tíðina, men hann hevði neyvan hugsað, at honum ikki undist at halda jól í nýggju snotiligu húsunum, sum hann og Magnhild hava bygt í Rituvík. Saknurin er stórur hjá okkum øllum, sum stóðu honum nær. Vit kunnu bara ugga okkum við nógvum góðum minnum um Frithiof, sum eisini var so trúfastur og kærleiksfullur, serliga tá ið okkara familja varð rakt av stórari sorg fyri 25 árum síðan.

Ærað veri minnið um Frithiof Olsen.

**Hans**

# Viðmerking

## Nú má vera nokk flutt úr Tórshavn



**Levi Mørk**
*býráðslimur fyri Javnaðarflokkin*

Tað nýggjasta dømi at flyta stovnar úr Tórshavn er tað, sum Landsstýriskvinnan Helena Dam á Neystabø, hevur avgjørt, at gera umfatandi bygnaðarbroytingar innan allar hægri útbúgvingar í Føroyum. Nú skulu útbúgvingarnar hjá Vinnuháskúlanum flytast úr Havn til Klaksvíkar.

Eg sum býráðslimur í Tórshavn vil als ikki góðtaka, at Tórshavn sum býur missir Vinnuháskúlan til KLAKSVÍKAR.

Tað sær út til, at borgarligi vongurin í Klaksvík, sum er væl umboðar á Føroya Løgtingi hevur stórt vald, og tað er kanska heldur ikki so løgið, tí teir eru partur av samgonguni, og har skal alt jú hanga saman við fíggjarætlan og við politisku visiónum hjá teimun í har valda.

Tað sær eisini út til, at tað eru rossahandlar upp í hesri ætlan, her hugsi eg um, hvat tað er fyri eitt argument fyri at flyta Vinnuháskúlan til Klaksvíkar? Er tað kanska ikki fyri at kabalin við nýggja studentaskúlan á Marknagili skuldi ganga upp hjá núverandi samgongu á Føroya Løgtingi, ella hvat liggur aftanfyri?

Ja, tann borgarligi vongurin í samgonguni skuldi atkvøða fyri nýggjum studentaskúla á Marknagili og tað hevur so tann prís, at tær lægru ikki akademisku skúlaútbúgvingarnar skulu til Klaksvíkar. Er tað ikki soleiðis, tað er komið til hesa niðurstøðu?

Ella hvat er grundarlagið at flyta ein 100 ára gamla skúla úr Tórshavn sum annars koyrir væl til Klaksvíkar?

Er tað kanska eitt álit um bygnaðarbroytingar sum ger seg galdandi?

Jú tað er gott við ymiskum álitum, um hvat er rætt og hvat er ikki so gott út frá ymiskum fyritreytum og kontekstum, ið vit tosað um.

Men tað er jú soleiðis, at tað er ikki altíð at eitt álit skal fylgjast og tað verður tað jú heldur ikki altíð, tað vita og kenna vit.

Tað veit núverandi samgonga eisini, um vit hugsa um tað nýggjasta dømi t.e. har áliti um eftirskúlan í Hvalba - hann skal nú vera í Sumba er tað nýggja dømi. Einki ímóti Sumba, men er hetta ikki ein máti, at fáa meira stríð fyri at køva ætlanina um eftirskúlan í Hvalba. Eg veit eisini, at tað fíggjarliga skal hanga saman, og fíggjarkorini eru trong innan menturnarøkið, tí nýggi skúladepilin í Havn fer við tí mesta. Eg frøist eisini um, at tað kemur ein skúladepil í Tórshavn, tað er ikki tað, men at prísurin er, at vit í Havn skulu missa Vinnuskúlan, er nýtt fyri meg, og tað má eg harðliga ganga ímóti sum býráðslimur fyri Tórshavnr bý.

Hetta kann ikki halda áfram, fyrst skal Rósa flyta sambylir til Vágar, og nú skal Helena geva Vinnuháskúlan til Klaksvíkar, hetta er púra burtur við og ein politiskur rossahandil í samgonguni. Er alt hetta so væl gjøgnumhugsað? Er tað ikki líka gott, ella kanska betri, at skiparar og skipsførarar vera saman, sum nú er etc. Hví bólka sundir og flyta hetta?

Hevur tað bara nakað við BA – støði og ikki akademiskstøði at gera, er tað ikki bara ein politisk kabal sum skal ganga upp?

Hetta má Tórshavnar býráð stegað við allari megi. Nei Helena, hetta er púra burturvið og kann ikki góðtakast. Nú má vera nokk við at flyta fleiri útbúgvingar og harvið arbeiðspláss úr okkara høvðusstaði.